Juni 1994 dagur	SÓLIN upp	í suðri	niður	Longd á degnum	Munur vetur	summar
23 Hós Tórshavn	3.41	13.29	23.17	19.36	+14.35	+ 0.00
24 Frí	3.41	13.29	23.17	19.36	+14.35	+ 0.01
23 Hós Mykines	3.43	13.33	23.22	19.39	+14.40	+ 0.00
24 Frí	3.44	13.33	23.22	19.38	+14.39	+ 0.01
23 Hós Sumba	3.49	13.29	23.08	19.19	+14.03	+ 0.00
24 Frí	3.50	13.29	23.08	19.19	+14.03	- 0.01
23 Hós Viðareiði	3.35	13.28	23.22	19.47	+14.55	+ 0.00
24 Frí	3.35	13.28	23.22	19.47	+14.55	+ 0.01

Dimmalætting

NR. 71 • Hósdagur 23. juni 1994 • 117. árgangur • Tlf. 11212

Juni 1994 dagur	MÁNIN upp	í suðri	niður
23 Hós Tórshavn	22.46	1.01	4.04
24 Frí	23.16	2.01	5.22
23 Hós Mykines	22.51	1.05	4.07
24 Frí	23.21	2.05	5.25
23 Hós Sumba	22.41	1.01	4.10
24 Frí	23.12	2.01	5.27
23 Hós Viðareiði	22.49	1.00	3.59
24 Frí	23.18	2.00	5.18

Tíðindir uttaneftir

Myrkaspæl um kjarnorku

USA heldur framvegis fast við, at Norðurkorea skal steðga allari framleiðslu, sum kann setast í samband við kjarnorkuvápn, áðrenn nakrar samráðingar kunnu byrja millum USA og Norðurkorea.

Alt bendir kortini á, at embætismenn úr Norður- og Suðurkorea hittast við samráðingarborðið, høast treytirnar fyri einum fundi, har eisini USA er við, tykjast leggja fót fyri trý-landa samráðingum.

Tað kom rættiliga glið á, eftir at fyrrverandi forseti USA, Jimmy Carter, hevði vitjað í Norðurkorea, og millum annað tosað við forsetan, Kim Il-Sung. Stjórnin í Suðurkorea kom við uppskotinum um nakrar fyrireikandi fundir á embætsstigi, í marknaðarbygdini Panmunjon.

Norðurkorea hevur góðtikið, at halda hesar fundir longu 28. juni. Fundirnir skulu leggja støðið undir samráðingum millum forsetarnar báðar í Norður- og Suðurkorea.

Hóttanin úr USA um at seta handilstiltøk í verk móti Norðurkorea stendur tó við. USA vil heldur ikki undir nakrar beinleiðis samráðingar við Norðurkorea, um ikki norðurkoreanska stjórnin fyrst lýkur triggjar treytir.

Fyrsta treytin er, at Norðurkorea heldur uppat við at flyta uran úr kjarnorkuverkinum í býnum Yongbon, onnur treytin er at kjarnorkuverkið ikki aftur verður riggað til at virka ríkað uran og at enda skulu ST-eygleiðarar fáa vissu fyri, at teir sleppa at verða verandi í landinum.

Tíðliga mikumorgunin hevði stjórnin í Norðurkorea framvegis ikki svarað.

rb/afp/reuter-glp



Mynd: Kollmar

Mongum mundi seismikkheimurin um borð á Sea Star kennast sum vitjan á eini amerikanskari kjarnorkustøð. Hjálm á høvdið og alt handa slag av teldum og tólum at skráseta jørðildið í undirgrund okkara og havbotni. – Her kannar Johan Mortensen, bretskur konsul í Føroyum, seismikkkort. Hann er ein av heitastu forsprákarum fyri framtíðar oljuvinnu í Føroyum

Løgreglumenn ákærdir fyri dráp

Tríggir løgreglumenn vóru so harðligur við eina kvinnu av Jamaica fyri ári síðan, at hon doyði tveir dagar seinni. Týsdagin vórðu løgrelumenninir ákærdir fyri dráp.

Kvinnan var komin til Onglands av Jamaica, men hevði ikki uppihaldslógvi. Hon skuldi tí vísast av aftur landinum, og tað skuldu teir triggir løgreglumenninir frá Scotland Yard syrgja fyri.

Hetta var í juli mánaði í fjør, og løgreglumenninir fóru ikki fram við mýkindum, tá teir skuldu handtaka kvinnuna.

Tann 40-ára gamla Joy Gardner varð løgd í eitt serliga magabelti, hendurnar vórðu síðan bundnar. Fyri at sleppa undan at lurta eftir henni, klistraðu teir eisini eitt heftiplástur fyri munnin.

Hetta var ov nógv fyri kvinnuna, sum eftir stuttari tíð fór í tað tey kalla »koma«, og hon kom ongantíð til sín sjálvs aftur. Tveir dagar seinni doyði hon á sjúkrahúsi.

Hendingin vakti vreiði millum innflytarar í Onglandi, og hevði við sær umfatandi atfinningar frá mannarættindabólkum í Onglandi.

rb/afp-glp

Franskir hermenn til Rwanda

Hóast Vestursamgongan mælti frá at senda hermenn til Rwanda, so vónar Frakland framvegis at fáa grønt ljós at senda hermenn til landið – við vælsignilsi úr ST.

Trygdarráðið í ST hevur fund næsta týsdag, og tá væntar Frakland, at grønt ljós verður givið fyri, at franskar herdeildir verða sendar til Rwanda, við tí endanmáli at steðga blóðbaðnum.

Tað eydnaðist ikki Fraklandi týsdagin at yvirtala limalondini í Vestursamginguni, um at senda hermenn til Rwanda.

Nú verður vónin so sett til trygdarráðið í ST. Franska uppskotið verður ikki heilsað vælkomið í Rwanda, hvørki av stjórnarherinum ella uppreistarherinum, RFP, sum nú er við yvirlutan.

Samstundis sum Frakland boðaði frá, at landið er til reiðar at senda hermenn til miðafrikanska landið, um ST gevur grønt ljós, komu ófrættakend tíðindi úr høvuðsstaðnum í Rwanda, Kigali.

Uppreistarherurin hevði hótt ST-hernaðareygleiðarnar frá Senegal, Kongo og Togo, sum tískil avgjørdu at taka allar hermenninar úr Kigali.

rb/reuter-glp

Tingast um Guatemala í Oslo

Í nakrar dagar hava stjórn og uppreistarmenn í Guatemala tingast í Oslo um frið í heimlandinum. Samráðingarnar vóru um at slitna týsdagin.

Samráðingarnar snúgva seg millum annað um at seta eina nevnd, ið skal kanna eina rúgvu av brotsgerðum, partarnair leggja hvønn annan undir at hava framt. Um alt gekk eftir ætlan, skuldu samráðingarnar verið endaðar seinasta leygardag.

Tað var um reppið, at partarnir ikki fóru heimaftur uttan nakað úrslit. Men norðmenn høvdu lagt hart tryst á partarnar, sum síðan gingu við til at leingja samráðingarnar til næsta týsdag.

rb/ntb-glp

Royndarboringar eftir olju longu um tvey ár

Tá seismiskar royndir fyrst eru settar í verk, gongur skjótt rætta vegin. Og longu nú hevur fyrsta stigið havt ítøkiliga effekt, tí í sambandi við kanningar í boriholinum í Lopra hevur Landsverkfrøðingurin sett kranar og onnur amboð upp, og harvið er arbeiði til vinnuførar hendur

PÓL Á KLETTI

Mongum mundi seismikkheimurin um borð á Sea kommunalum pláni og Star kennast sum vitjan á eini amerikanskari kjarnorkustøð. Hjálm á høvdið og alt handa slag av teldum og tólum at skráseta jørðildið í undirgrund okkara og havbotni.

Jú, sera professionelt alt samalt. Tó, tey fægstu, sum vitjaðu um borð á skipinum í farnu viku, skiltu henda serskilda fakheim. Tað er tað ítøkiliga – um olja í royndini –, sum hevur áhuga. At dollarar eru í heimta.

Millum umboð fyri feløg og stovnar vitjaðu eisini politikarar umborð - bæði á landspláni. Í bløðunum er hópur av valgreinum at lesa nú tað stundar móti vali. Men tað er ikki ein, sum yvirhøvur nevnir oljuvinnuna og tær spennandi forkanningar, sum nú eru settar í verk, uttan í onkrum eykasetningi.

Men at tí, sum teir serkønu frá Western Geophysical Corporation siga, skilst, at her eru góðir framtíðar vinnumøguleikar hjá føroyska samfelagnum. Og hava teir rætt, so verður uðsmálunum hjá tí landsstýri, sum tekur við eftir løgtingsvalið 7. juli.

Um borð á Sea Star er ið hvussu er breið semja um, at olja er í føroysku undirgrundini. Spurningurin er bert, hvussu langt niðri hon er.

Vanliga fatanin millum føroyingar er, at oljuvinna verður eingin í bræði. Men longu um jóltíðir hevur Western fyrstu úrslitini av kanningum sínum tøk og verða seld oljufeløgum. T. v. s. um 4-5 mánaðir. Og tað er ovurhonds stórur áhugi at keypa hesi úrslit. Norsk, bretsk og amerikansk oljufeløg liggja framvið.

Komandi vár verður meira seismikkur skotin. Og sannlíkt er, at um tey úrslitni eru positiv - og vónandi verða tey tað - verður fyrsta royndarboringin á føroyskum øki sett í verk í 1996. Um tvey ár!

Hetta er kollvelting.

Teknisku trupulleikarnir, sum áður hava staðist av at kanna dýpdir, eru í dag ikki nøkur forðing. Øll útgerð í dag er so framkomin, at hon megnar ætlaðu uppgávurnar.

Tann basaltflóin, sum á okkara landgrunnsstøði er oman á løgunum, ið kunnu hugsast goyma olju, er ikki sunnan fyri Hetlandsrennuna, men annars er jørðildið tað sama - og har eru ríkar oljukeldur.

Aðrastaðni eru dømi um, at olja er undir eini slíkari flógv, men eisini, at olja er í sokallaðum lummum í sjálvari flónni.

At áhugin fyri føroyska økinum er so stórur, er fyri tað fyrsta tí, at ein hevur funnið olju beint sunnanfyri. Og fyri tað næsta, at tann olja, sum er aðrasteðs í verðini - í Kina, Vietnam og SNG, alt stórar nøgdir - er so langt frá marknaðunum í mun til okkara oljuleiðir. Hartil kemur, at nógvir politiskir trupulleikar eru knýttir at londunum eysturi í Europa og í Fjareystri. Hjá okkum valdar politiskur stabilitetur. Føroysk oljuvinna er bert ein náturlig ekspansjón av verandi oljuleiðum her norðuri í Atlantshavi.

Tá seismiskar royndir fyrst eru settar í verk, gongur skjótt rætta vegin. Og longu nú hevur fyrsta stigið havt ítøkiliga effekt, tí í sambandi við kanningar í boriholinum í Lopra hevur Landsverkfrøðingurin sett kranar og onnur amboð upp, og harvið er arbeiði til vinnuførar hendur.

Sea Star skuldi ætlandi gera seismiskar kanningar á Lopransfirði fyrst í hesi vikuni, men orsakað av at brek var á sambandinum við samskiftisstøðina á landi, vórðu hesar av ongum. Skipið fór tí í staðin suður um Føroyar at skjóta eina »testlinju«.

Fyri 20 árum síðan arbeiddi Western á føroyskum øki sunnanfyri - tá seismikkur varð skotin út í sambandi við kortleggingar av havbotninum frá Írlandi og norður til Jan Mayen. Tær veldugu oljukeldurnar, BP hevur funnið skamt sunnan fyri føroyska markið, eru partur av teim seismisku úrslitum, Western tá kom til. Nú ber so til at reprocessera tað tilfar, Western hevur tøkt um part av føroyska landgrunninum.

Hesin forkunnleiki saman við 50-60 ára royndum á økinum og einum av heimsins mest framkomnu seismikkskipum skuldu givið føroyingum vónir um, at »svarta gullið« er til í okkara undirgrund.



Mynd: Dimmalætting/Kristian

Sea Star skuldi ætlandi gera seismiskar kanningar á Lopransfirði fyrst í hesi vikuni, men orsakað av at brek var á sambandinum við samskiftisstøðina á landi, vórðu hesar av ongum. Skipið fór tí í staðin suður um Føroyar at skjóta eina »testlinju«. Fyri 20 árum síðan arbeiddi Western á føroyskum øki sunnanfyri – tá seismikkur varð skotin út í sambandi við kortleggingar av havbotninum frá Írlandi og norður til Jan Mayen

Ferd'nand



Veðrið

Sunnan fyri eitt lágtrýst millum Ísland og Lofoten blæsir køld og óstøðug luft framvegis inn yvir Føroyar vestaneftir. Men sum fráliður fer ein minni hátrýstryggur at førka seg móti Føroyum vestaneftir við støðugari veðri.

Veðurvánirnar fyri Føroyar.

Í dag:

Skýggjað og seinni um dagin einstøk æl. Hitin verður millum 6 og 9 stig. Upp til hvassan vind av vestri og útnyrðingi, 13 m/s. Seinni minkandi til lot av útsynningi, minni enn 8 m/s.

Fríggjadagin:

Samdrigið, men helst turt í veðrinum. Hitin verður millum 6 og 9 stig. Eitt fleyr av útsynningisuðuri, millum 3 og 8 m/s.